GJALDSTOVAN

## Teldutilboð til KT Landsins

Hervið verður biðið um tilboð uppá:  65 farteldur, av merkinum HP, Lenovo, Fujitsu, Dell ella Microsoft, við levering í seinasta lagið 10. januar.

Minstu krøv til allar teldurnar:

- Intel Core i5-1021U ella AMD Ryzen 5 4500U
- 256 GB SSD Harðdisk
- 16 GB RAM
- Windows 10 Pro
- 13-14,5” skerm
- Full HD (1920x1080) upploysing
- TPM 2.0
- Innbygt gigabit netkort
- Metal ella kolfibur kabinett (palmrest, lok og botnur - minst 2 av 3 skulu vera úr metal/kolfibur)
- Innbygdan fingramerkis lesara
- Tráðleyst netkort (Dual Band 802.11a/b/g/n/ac/ax), ið stuðlar Miracast
- Bluetooth 4.1
- USB 3.1 og USB Type-C
- Innbygd webcam, hátalarar og mikrofon
- Teldan skal hava tilhoyrandi USB-C dokkingstøð, ið hevur power knøtt, ið kann brúkast til at tendra telduna við. Eisini skal docking støðin hava í

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

minsta lagið 4 stk USB, gigabit LAN og 1 USB-C (umframt tað ið verður brúkt at seta telduna til docking støðina)

- Stuðla 2 eksternum skermum tá teldan er dokkað (við HDMI ella Displayport) við upploysn á 3840x1600
- Streymveiting til teldu og dokkingstøð = 2 stk.
- 3 ára garanti, frá tí at teldan er útflýggjað. Er garanti ikki er eins fyri allar lutirnar ynskist hetta útgreinað
- Skal lúka umhvørvisgóðkenningar so sum Svanamerki ella EPEAT Gold
- Veitarin skal vera góðkendur av framleiðaranum, antin sjálvur ella ígjøgnum triðjapart, til at gera umvælingar av telduútbúnaðinum í Føroyum.
- Allar teldur, við dockingstøð skulu verða leverað í seinsata lagið 10. januar

Soleiðis vera tilboðin fyri farteldunar vektað:

| **Vekting:** | **%** |
|---|---|
| Prísurin á farteldum | 60 |
| Útyvir minstakrav[**1**] | 10 |
| Vekt á farteldu | 15 |
| Støddar mát á farteldu | 10 |
| Battarítíð á farteldu | 5 |
| **Samlað** | 100 |

[**1**] Útyvir minstakrav er tað, sum teldan hevur útyvir minstu krøvini. Tað kann verða fult Metall/kolfibur kabinet, meira RAM, CPU o.s.fr. Tað vil vera ein meting í hvussu nógv hvør eyka funktión telur.

GJALDSTOVAN

Tey, sum lata tilboð inn uppá borðteldur, skulu útfylla og lata inn hjálagda svar skjalið, ið skal sendast saman við tilboðnum (sum excel fíla):

" **Tilboð - Lagurteldur Nov 2021 - VEITARI.xlsx**".

Vektingin verður normalisera út frá nøgd. Tað vil siga, at av tí at 80% av útboðnum eru tær lítlu teldurnar, so koma tær at standa fyri 80% av samlaðu vektingini. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum – um nakað – tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.

Talan er um eitt samla tilboð, soleiðis at um tikið verður av nøkrum tilboðið, verða allar teldurnar keyptar frá sama veitara.

Um vøran verður latin seinni enn til avtalaðu tíð, tilskilar KT Landsins sær rættin til at taka hettar við í viðgerðina tá næsta útboð er til viðgerðar.

Tilboðið skal stílast til:

KT Landsins T-postur: ktskivan@gjaldstovan.fo

Øll, sum hava latið tilboð inn, fáa svar um niðurstøðuna. Keypari metir seg kunna geva svar, um tikið verður av tilboðnum ella ikki, umleið 1 viku, eftir at tilboðsfreistin er farin.

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri.

Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og annars viðgjørdir skrivliga við tí fyri eyga lættari at kunna skjalprógva samskiftið.

Spurningar skulu stílast til:

Bjarni Fríðberg bjarni@gjaldstovan.fo

Telefon.: 35 24 93

Við hesum verður takkað fyri áhugan og verður sæð fram til at hoyra aftur frá tykkum.

Vinaliga heilsan
KT Landsins - Gjaldstovan